# Klaksvíkar Sjúkrahús klagað fyri Løgtingsins Umboðsmanni

**Tey, sum hava klagað, vilja hava, at nýggi starvið sum yvirportørur, skal setast av nýggjum**

ALMENNUR SETANARPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




Løgtings Umboðsmaður hevur nú aftur fingið eitt mál um almennan setanarpolitikk at gera.

Hesuferð er tað Klaksvíkar Sjúkrahús, sum er klagað.

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur stutt síðani sett nýggjan leiðara fyri ambulansutænastuna í starv.

Men í hesum sambandi verður sjúkrahúsið skuldsett fyri at hava brotið tann almenna setanarpolitikkin.

Hinir umsøkjararnir, sum vóru til starvið vilja ikki góðtaka mannagongdina og teir hava sostatt vent sær til fakfelag sítt.

Portørarnir eru allir limir í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hans Joensen, formaður í Havnar arbeiðsmannafelag, sigur, at so leingi málið er í viðgerð, vil hann ikki ikki gera so nógvar viðmerkingar til tað.

Men hann váttar, at felagið arbeiðir við málinum um yvirportørin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Í fyrstu syftu varð málið kært fyri fyri almanna- og heilsumálaráðnum, men tað kom onki burturúr.

Og Hans Joensen váttar, at málið síðani er sent bæði Løgtingsins Umboðsmanni og sjálvum løgmanni.

### Skal setast av nýggjum

Í kæruni til Umboðsmannin er páhaldið, at starvið sum leiðari fyri ambulansutænastuna verður sett av nýggjum.

Hans Joensen sigur, at tað, sum hevur fingið partarnar at kæra fyri Løgtingsins umboðsmanni, er, at eftir teirra tykki, hevur Klaksvíkar Sjúkrahús ikki hildið seg til almenna setanarpolitikkin, tá ið starvið varð lýst leyst.

Hann vil kortini ikki í smálutir í málinum.

Men í kæruni til Løgtingsins Umboðsmann verður mett, at tað eru framd so stór brot á almenna setanarpolitikkin, at tað einasta rætta, er, at starvið verður lýst leyst av nýggjum, so at alt málið kann ganga umaftur.

Teir, sum annars hava søkt málið, hava heldur ikki hug at gera viðmerkingar.

Men keldur, vit annars hava tosað við, siga, at eitt, sum kært verður um, er at sjúkrahúsið onga setanarnevnd setti at meta um umsøkjararnar. Í hvussu so er var talan ikki um fólk við serligum innliti í starvið sum yvirportørur.

Heri Ellingsgaard, umsjónarmaður fyri Klaksvíkar Sjúkrahús, hevur ongar viðmerkingar til málið.

Hann sigur, at talan er um persónsmál og tí vil hann ikki gera viðmerkingar til tað. Hann vil heldur ikki gera viðmerkingar til eitt mál, sum er til viðgerar hjá Løgtingsins Umboðsmanni.

Kortini er tað hansara greiða fatan, at tær linjur, sum eru lagdar í almenna setanarpolitikkinum, eru hildnar. Men smálutirnar um setanarnevnd og annað, vil hann ikki inn á.

Annars skal nýggi leiðarin fyri ambulansutænastuna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi byrjað í starvinum í morgin, 1. juli.

## Brot úr setanarpolitikkinum hjá tí almenna

**Niðanfyri prenta vit nøkur brot úr almenna setanarpolitikkinum, sum hava týdning fyri hetta málið og sum mett verður, at spurnartekin kann setast við í hesum føri**

**Endamál:**
Endamálið er at tryggja, at stovnurin setir umsøkjara, ið, úr einum heildarsjónarmiði, er best egnaður til starvið. Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.

**Vátta fyri móttøku**
Arbeiðsplássið skal helst beinanvegin, og í seinasta lagi tríggjar dagar eftir at umsókn er komin, senda umsøkjaranum váttan um, at umsóknin er móttikin. Samstundis verður boðað frá, nær umsóknin verður viðgjørd.

**Viðgera umsóknirnar**
Setanarnevnd verður sett at meta um umsøkjarar, viðgera umsóknir og hava setanarsamrøður. Í setanarnevndini skulu verða umboð fyri leiðslu og starvsfólk, t.d. umboð fyri ávísar starvsbólkar, ið viðkoma starvsøkinum, og álitisfólk.

Tað er av stórum týdningi, at setanarnevndin er umboðað við fólki, sum hevur førleika at meta um umsøkjarar, tá talan t.d. er um starv, ið krevur serligan fakligan førleika.

**Grundgevingar**
Noktandi svar skulu vera skrivlig og grundgivin.

Í grundgevingini skal verða kunnað um støði undir avgerðini. T.d. hví mett er, at førleikin hjá tí, ið settur er í starvið, svarar betur til settu krøvini, enn førleikin hjá tí, ið ikki er settur – eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum og/ella samstarvsvilja.

**Innannhýsis umsøkjarar**
Leiðari skal tosa við innanhýsis umsøkjarar, ið ikki fáa starvið, áðrenn boðað verður frá, at starvið er sett.



# Avgerðin um løgregluna nærkast

**Danski løgmálaráðharrin Lene Espersen hevur svarað fyrispurningi um miðsavnan av føroysku løgregluni, og tað tykist nú verða greiðari enn nakrantíð, at sýslumansembætið í Vestmanna verður flutt til Havnar, meðan stórar skerjingar skulu fremjast á politistøðini í Vágum**

LØGREGLAN
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*




*Eftir greiðar útsagnir frá føroyska fútanum og danska løgregluovastanum tykist nú vera greitt, at sýsluembætið í Vestmanna verður avtikið og flutt til Havnar, og løgreglumanningin í Vágum verður skerd munandi*

Miðskeiðis í apríl tók stríð seg upp um føroysku løgregluna í fjølmiðlunum. Tjóðveldispolitikararnir Høgni Hoydal og Heidi Petersen settu síðani fram fyrispurningar á fólkatingi og í løgtingi um ætlanirnar at miðsavna føroysku løgregluna, og Mogens Nepper Christensen fúti váttaði tá, at ætlanir vóru um broytingar. Sýslumansembætið í Vestmanna skuldi sambært fútanum flytast til høvuðsstaðin, og skerjingar skuldu fremjast í løgreglumanningini í Vágum, har átta fólk í løtuni starvast.

### Ongar uppsagnir

Eftir fyrispurningar er svar nú loksins komið frá danska løgmálaráðharranum Lene Espersen, sum hevur vent sær til fútan í Føroyum og løgregluovastan í Danmark. Svarið hjá løgmálaráðharranum er tí í stóran mun sitat frá føroyska fútanum og danska løgregluovastanum, og hóast eingin avgerð er tikin, tykist tað vera greiðari enn nakrantíð, at stórar broytingar skulu fremjast í Vágum og í Vestmanna á løgregluøkinum.

Fútin í Føroyum, Mogens Nepper Christensen, heldur í svarinum hjá Lene Espersen fast um somu sjónarmið, sum áður hava verið frammi: At sýslumansembætið í Vestmanna skal flytast til Havnar, og at broytingar og skerjingar skulu fremjast á løgreglustøðini í Miðvági, men at støðin tó skal varðveitast.

í svarinum hjá Lene Espersen sigur fútin í Føroyum, at hann heldur fast um hesa áskoðan, men at talan tó ikki verður um uppsagnir í Vágum. Tað eigur sambært honum at bera til, at starvsfólk heldur skulu flytast, og álitisfólk og fakfólk skulu takast upp á ráð, áðrenn avgerðir verða tiknar, sum koma at ávirka starvsfólkini. Sum heild tykist tað tó vera greitt, at tað ikki leingi afturat vera átta starvsfólk á løgreglustøðini í Miðvági.



*Fútin í Føroyum, Mogens Nepper Christensen, heldur fast um sjónarmiðið at fremja stórar broytingar á løgregluøkinum í Vágum og Vestmanna*

### Arbeiðsbólkur

Men broytingarnar í føroysku løgregluni hava leingi verið á veg. Mogens Nepper Christensen ger í svarinum hjá Lene Espersen eisini vart við, at hann hevur sett ein føroyskan arbeiðsbólk at kanna møguleikar fyri broytingum, sum sýslumaðurin í Suðuroy, Sommer Joensen, hevur staðið fyri.

Arbeiðsbólkurin er eisini komin fram til úrslit, og niðurstøðurnar eru somuleiðis, at sýsluembætið í Vestmanna eigur at verða niðurlagt og flutt til Havnar, og løgreglumanningin í Miðvági skal skerjast.

Orsøkin til hesar framtíðarætlanir eru at finna í infrastrukturellu broytingunum. Undirsjóvartunnilin broytir trygdarligu umstøðurnar í Vágum, og tað tykist sambært niðurstøðuni hjá arbeiðsbólkinum ikki vera neyðugt við átta starvsfólkum á støðini í Miðvági. Arbeiðsbólkurin mælir sostatt Mogens Nepper Christensen til at fremja effektiviseringar og rationaliseringar í Vágum, hóast løgreglustøðin sjálv skal varðveitast.

### Mótstøða

Umframt ónøgd frá fleiri politikarum er talan eisini um innanhýsis ósemju hjá løgregluni í Føroyum. Limir í stýrisbólkinum hjá løgregluni fyri komandi broytingar í Vágum og Vestmanna hava víst á, at frágreiðingin hjá arbeiðsbólkinum ikki eru haldgóðar.

Orsøkin til misnøgdina er, at arbeiðsbólkurin við Sommer Joensen á odda ikki hevur viðgjørt vandarnar við skerjingunum í Vágum og avtøkuni av sýslumansembætinum í Vestmanna.

Í svari sínum til løgmálaráðharran ger fútin vart við, at hann tí ikki treytaleyst ætlar at fylgja tillmælinum hjá arbeiðsbólkinum, men hann hevur framvegis ta fatan, at broytingar eru neyðugar í Vágunum og Vestmanna.

Nú fer Mogens Nepper Christensen so at viðgera málið saman við danska løgregluovastanum, áðrenn nøkur avgerð verður tikin frá teirra síðu.

### Fútin fær undirtøku

Í stuttari viðmerking í svarinum hjá Lene Espersen til Høgna Hoydal sigur danski løgregluovastin, at hann tekur undir við ætlanum um broytingar í Vágum og Vestmanna, men at hann ynskir at fáa kjak í lag við føroysku løgregluna um spurningarnar.

Sambært honum er aðalendamálið at tryggja øllum eina professionella og effektiva løgreglutænastu, eisini við støði í broytingunum í føroysku samferðsluviðurskiftum.

Niðurstøðan tykist vera, at sýsluskrivstovan í Vestmanna fer í søguna, og skerjingar verða gjørdar í løgreglustøðini í Vágum.

## NATO-støðin kanska niðurleggjast

**Danski verjumálaráðharrin hevur svarað fyrispurningi frá Høgna Hoydal um framtíðar NATO-virksemi í Føroyum, men enn er eingin avgerð tikin**

NATO
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

16. juni setti føroyski fólkatingslimurin Høgni Hoydal danska verjumálaráðharranum fyrispurning um framtíðar NATO-virksemi í Føroyum. Upprunin til fyrispurningin var nýggj donsk verjupolitisk semja um eitt uppskot, sum m.a. hevði til endamáls at skerja hernaðarliga virksemið í Føroyum við sparingum fyri eyga. Hetta merkir, at NATO- støðin í Mjørkadali møguliga verður niðurløgd.

### Eingin avgerð tikin

23. juni kom svar frá danska verjumálaráðharranum Søren Gade um ætlanirnar hjá donsku stjórnini viðvíkjandi sparingum og møguligari niðurlegging av Nato-virkseminum í Føroyum. Søren Gade vísir á, fyrst skal breið semja finnast um ætlanirnar at niðurleggja NATO-støðina í Føroyum, og at føroyska stjórnin skal takast við uppá ráð, áðrenn nøkur avgerð verður tikin í málinum.

Søren Gade sigur, at spurningurin um víðari NATO-virksemi í Føroyum skal avgreiðast í nærmastu framtíð, og at bæði NATO og Føroya Landsstýri verða við at mynda endaliga úrslitið.



*Høgni Hoydal hevur nú fingið svar frá danska verjumálaráðharranum, sum sigur, at NATO-støðin í Føroyum møguliga verður niðurløgd við sparingum fyri eyga*